# Runavíkar Kommuna
søkir eftir

## Starvsfólki til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
- 2 pedagogum 30t/35t um vikuna, til vøggustovrunar
- 2 pedagogum 30t/35t um vikuna, til barnagarðstovurnar

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú verður ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett 17. august 2009 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2009, kl. 12.00.

***Runavíkar Kommuna***
***Heiðavegur 26***
***Postrúm 139***
***FO-610 Saltangará***

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

# Ger dreymin til veruleika



**Njótið summarið - ger heim títt og lívið ríkari við eini havastovu frá UNIK UDESTUER.**

**Tú fært eina hugnaliga havastovu, ið gevur nógvar møguleikar fyri hugna saman við vinum og familju**

unik udestuer
www.unikudestuer.dk

**MARKÁ Sp/f**
Tlf. 212662

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

## LÍVBJARGARI

Fuglafjarðar kommuna lýsir hervið 1 starv sum lívbjargari við svimjihøllina við Fuglafjarðar skúla leys til setan tann 15. august 2009. Talan er um kvinnuligan lívbjargara.

Viðkomandi skal hava ella taka góðkenda lívbjargararoynd.

Arbeiðtíðin verður 13 tímar um vikuna hjá hvørjum.

Lønin verður ásett sambært sáttmálan millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsningar um størvini kunnu verða fingin til vega við at venda sær til lívbjargaran á telefon 444.228 ella til býráðsskrivstovuna á telefon 737702 í vanligari avgreiðslutíð.

Møguligar umsóknir skulu verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 03. juli 2009 kl. 15.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 15. juni 2009*

**FUGLAFJARÐAR KOMMUNA**



## Sethús við Ljósáir

Vegna Føroya Skiftirætt verður sethúsaognin matr. nr. 83b, Eiði, Mylnuvegur 1, Ljósá við hesum lýst til sølu.

Húsini, sum eru umleið 140 $m^2$ til víddar, liggja serstakliga væl fyri við góðum útsýni. Húsini eru stoypt og klædd við timbri og hava jarntekju. Í húsinum er ein stova, stova / køkur, 4 kømur og bæðirúm.



## Neystaogn við Ljósáir

Vegna Føroya Skiftirætt verður neystaogn á leigaðari grund við Ljósáir við hesum lýst til sølu.

Talan er um helvtina av niðaru hædd av neystaogn, sum er umleið 4,12 m til víddar. Yvirbygning-urin er ikki við í søluni.

Áhugaði kunnu venda sær til

**Advokatvirkið**

**Páll Nielsen**
**Sigmund Poulsen**
**Eyðhild Skaalum**
**Hans Trygvi Teirin**

Skansavegur 1
Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71
fax 31 58 74
pall@advokatvirkid.fo



## Tvíhús á Oyri

Um áhugi er fyri at ogna sær eini tvíhús á Oyri, kunnu hesi keypast innilokað, liðugt smíðað, ella lyklaklár (málað og tapetserað) fyri ein rímiligan penga.

**Ring á tlf. 224915**

LØGTINGIÐ

## Starv sum tingskrivari/ skrivstovufólk í Løgtinginum

Eitt starv sum tingskrivari/skrivstovufólk í Løgtinginum er leyst at søkja til setan pr. 1. august 2009.

Starvslýsing og nærri upplýsingar um starvið eru at finna á www.logting.fo.

***Løgtingið, 18. juni 2009***

Lesið Sosialin -so eru tit við!